# Filmsvinna á veg til Føroya

**Ein verkætlan, ið skal gera filmsvinnu til veruleika í Føroyum, er nú um at taka skap. Verkætlanin er eitt framhald av filmssummarskúlanum, sum var hildin fyri norðurlendskum ungdómum í 2006. M.a. stuðlar ES ætlanini**

NÝGGJ VINNA
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

- Eg ivist onga løtu í, at vit kunnu fáa eina filmsvinnu í Føroyum. Tað eru nógvir føroyingar, sum hava áhuga og sum eru undir útbúgving í filmi, og tey skulu hava møguleikan at taka stigi frá at hava eitt ítriv og til at skapa ein vinnuveg, sigur Steinbjørn í Dali, sum er verkætlanarleiðari

Talan er um framhaldið av eini norðurlendskari verkætlan har Føroyar, Svøríki, Noreg, Finland og nú eisini Skotland eru við í. Tað eru Samvit og Klippfisk, sum í felag standa fyri føroyska partinum av verkætlanini, sum er skipaður soleiðis, at øll londini hava verkætlanir fyri egnum íbúgvum, umframt at tað so eisini eru nøkur felags tiltøk fyri ungdómar úr øllum londunum. Hesum felags partinum tóku føroyingar sær av í 2006, og tað var gjørt við einum businessspælið fyri íverksetarar, nevnt »start-up« og við filmssummarskúlanum, sum varð hildin í 2006.

- Vit byggja víðari á hesi bæði hugskotini, men nú vilja vit samantvinna tey, og soleiðis taka tað eitt stig longri. Ætlanin er, at fáa ein seriøsan filmsskúla, har næmingarnir skulu gera fyritøkur og á tann hátt tengja filmsítrivið saman við vinnuni. Endamálið er, at fáa nakrar íverksetarar, sum fara at tora at skapa eina filmsvinnu í Føroyum, greiðir Steinbjørn í Dali, sum er verkætlanarleiðari á Samvit, frá.



*Ein av norðurlendsku luttakarunum á summarfilmsskúlanum, sum var hildin í 2006. Í 2009 fáa norðurlendskir ungdómar aftur høvi at sleppa á filmsskúla í Føroyum, nú bæði ES, Nordisk kulturfond, Vinnuframi umframt føroyskar fyritøkur stuðlað verkætlanini.*

*Mynd Jens Kr. Vang*

## Professionellir lærarar

Steinbjørn í Dali sigur, at hetta ikki er ein norðurlendsk filmsverkætlan burturav, tí hini londini hava aðrar verkætlanir. Svøríki hevur tónleik, Skotland hevur sjónleik og teatur og Noreg hevur filmstøkni og internetsamskifti. Bert Føroyar hevur filmslist.

- Tað, sum er so áhugavert við filmslistini er, at tað eru so nógvar listagreinar samantvinnaðar. Tú hevur m.a. video og ljóð, tú skalt skriva eitt leikrit og gera búnar, vísir Steinbjørn í Dali á. Hann sigur, at valið fall á filmslist, eftir at Jákup Veyhe, Jan Berg Jørgensen og Mikkjal Helmsdal høvdu havt Agurk sendingarnar á Svf.

- Vit sóu hvussu stóran áhuga føroyingar høvdu fyri filmslist, tí tað komu óteljandi filmir inn til sendingina. Tí settu vit okkum í samband við teir í Klippfisk, og fingu eitt samstarv í lag við teir, greiðir Steinbjørn í Dali frá.

Filmssummarskúlin eydnaðist sera væl í 2006, og Steinbjørn sigur, at teir løgdu støðið høgt við at fáa professionell fólk at undirvísa. Bæði tí tey duga síni ting og hava drúgvar royndir, men eisini tí, at tey kunnu vera ein stórur íblástur hjá teimum ungu, við tað, at tey hava prógvað, at filmsdreymurin kann gerast veruleiki.

- Í ár taka vit tað so enn longri enn bert at hava ein summarskúla. Ætlanin er at gera ein kvøldskúla, sum kann byrja longu komandi summar, og sum kann halda fram inntil næsta filmssummarskúlan, sum verður í 2009. Í høvuðsheitum fer kvøldskúlin at fara fram umvegis internetið, tí á tann hátt kunnu vit nýta viðurkend filmsfólk sum undirvísarar, greiðir Steinbjørn í Dali frá.

## Skapa netverk

Steinbjørn heldur, at hetta er eitt sera týdningarmikið samstarv fyri føroyingar.

- Vit hungra eftir at fáa samband við onnur lond fyri at fáa nýggjan íblástur og skapa netverk. Hini londini eru so stór, at tey hava nóg mikið í sær sjálvum. Men um vit ætla okkum, at filmurin skal vera ein vinnuvegur í Føroyum, so mugu vit fáa íblástur uttanlands, tí her heima er eingin filmsmentan yvirhøvur, heldur hann.

Av tí, at ein seriøs roynd nú verður gjørd fyri at fáa filmslistina til ein veruligan vinnuveg í Føroyum, verður Klippfisk umskipað, soleiðis, at felagið fær ein dagligan leiðara, sum kann samskipa arbeiðið.

- Vit eru langt aftanfyri grannalondini, tá tað kemur til filmslist, og um hetta skal gerast ein vinna í Føroyum, mugu vit eisini á politiska pallinum gera okkum greitt, hvat vit vilja við hesum. Her er í øllum førum ein stórur møguleiki og ein stórur tørvur, vísir Steinbjørn í Dali á.

### FAKTA

- Verkætlanin eitur »No Cry«, ið stendur fyri Northern Creative Youth.

- Verkætlanin er ætlað ungdómum í Føroyum, Svøríki, Skotlandi, Noregi og Finlandi, upp til umleið 25 ára aldur, tó er aldursmarkið ikki strangt.

- Síðani seinasta filmssummarskúla, í 2006, eru fleiri føroyingar, sum hava tikið stigið fult út, og eru farnir undir filmsútbúgving.

- Eftir seinasta filmssummarskúla vóru nakrir føroyskir næmingar bodnir til ein norskan filmsfestival, har teir sluppu at sýna egnar filmir fram.

- Stuðul verður latin av ES, Nordisk Kulturfond, Vinnuframagrunninum, umframt frá føroyskum fyritøkum.

- Føroyski parturin av verkætlanini er eitt samstarv ímillum Samvit og Klippfisk.

- Endamálið við verkætlanini er at skapa áhuga og karmar fyri eini filmsvinnu í Føroyum.

# - Sjálvandi ber tað til

NÝGGJ VINNA
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

- Hetta er avgjørt eitt stig á leiðini til at fáa filmslistina á breddan í Føroyum. Eftir at summarfilmsskúlin eydnaðist so væl í 2006, settu vit okkum fyri, at vit vildu endurtaka hann. Nú fáa vit møguleikan við kvøldskúlanum og filmsskúlanum í 2009, greiðir Jan Berg Jørgensen, sum er nevndarlimur í Klippfisk frá.

Hann sigur, at fíggingin, sum fylgir við, ger, at Klippfisk verður ein aktivur og sjónligur felagsskapur.

-At umsóknin varð gingin á møti, prógvar, at vit kunnu vera við, og at vit hava fingið grønt ljós frá stórum altjóða felagskapum gevur verkætlanini ein ávísan seriøsitet, so sjálvandi ber tað til at hava filmsvinnu í Føroyum, heldur hann.



*Jan Berg Jørgensen, ið er ein av nevndarlimunum í Klippfisk, sigur, at hetta avgjørt er eitt stig á leiðini til at skapa eina filmsvinnu í Føroyum.*

*Mynd Jens Kr. Vang*

- Vit hava nógvan kreativan ungdóm í Føroyum, men um tey ongantíð fáa møguleika at koma við í filmsframleiðslu, so verður tað neyvan innan tað, tey útbúgva seg. So velja tey heldur myndlist ella tónlist ella okkurt annað. Tað ræður tí um at kunna tey um filmslistina so tíðliga sum gjørligt fyri at fanga tey, sum tíma hetta, og sum eftir lokna útbúgving kunnu koma aftur og gera føroyskar filmir, heldur Jan Berg Jørgensen.

- Skal filmslist gerast ein viðurkend vinna framyvir, er alneyðugt at hava fólk, sum veruliga trúgva uppá tað, og sum hava visjónir. Har hjálpir Miðlaverkstaðurin, sum nú er um at gerast veruleiki, við góðari hjálp frá Tórshavnar Kommunu, tí ungdómurin tíðliga verður kunnaður um filmsframleiðslu, greiðir Jan frá.

- Samanbera vit okkum við Ísland, so áttu vit at havt framleitt einar 10-15 føroyskar filmir, í mun til teirra 80. Men vit hava ikki ein einasta film, sum er framleiddur í Føroyum. Men tað kann broytast, og hendan verkætlanin er avgjørt eitt stig á leiðini, staðfestir Jan Berg Jørgensen.

- Í samband við verkætlanina hevur Klippfisk søkt eftir dagligum leiðara, og tað verður eitt fulltíðarstarv. Enn er starvið ikki sett, men tað er greitt, at tað verður hvørki Jan sjálvur, Jákup Veyhe ella Mikkjal Helmsdal, sum allir eru nevndarlimir í Klippfisk.